# Oljuvónir menna Føroyar fyri milliónir

**Hóast tað verður rópt "stuðul til vinnuliga førleikamenning", so er talan ikki um nakra menningarhjálp. Talan er um eitt gjald afturfyri at sleppa at troyta okkara náttúrutilfeingi. Við teimum báðum loyvisumførunum higartil er henda upphæddin blivin til 107,5 mió. krónur**

VINNULIG FØRLEIKAMENNING
*Eftir Hilmar Simonsen*



*Kirkjutorn og oljutorn hvørt um annað nýggja ímyndin av Havnini*

Í samband fyrsta og annað útbjóðingarumfar í føroyskum øki bundu oljufeløgini seg til at gjalda ávísar peningaupphæddir til vinnuliga førleikamenning. Við fyrsta útbjóðingarumfar í 2000 var samlaða upphæddin ásett til 85 mió. krónur, galdandi fyri loyvir fram til 2006. Við aðru loyvisrundu í 2005 var ein upphædd á 14 mió. krónur ásett.

Nøkur av fyrru loyvunum vórðu seinni longd fram til 2009, og tá bundu viðkomandi oljufeløg seg til at gjalda eina eykaupphædd á góðar 8 mió. krónur. Samlaða skyldan hjá oljufeløgunum til vinnuliga førleikamenning var við árslok 2006 sostatt komin upp á 107,5 mió. krónur, vísir ein uppgerð hjá Jarðfeingi, sum Sosialurin hevur fingið innlit í.

Petur Joensen, deildarleiðari á Jarðfeingi, vísir á, at meginparturin av hesum peningi longu er játtaður til ymsar verkætlanir, hóast sumt er fallið aftur orsakað av, at verkætlanir ikki eru gjørdar til endans. Eingin dagførd uppgerð er yvir einstakar játtanir, men eitt sindur av peningi er framvegis tøkur frá útbjóðingarumførunum.

- Tann upphæddin fellur ikki aftur til oljufeløgini, men verður játtað fyrr ella seinni, sigur Petur Joensen.

### Golf til vælhavandi ferðafólk

Oljufeløgini umsita sjálv hesar játtanirnar, og tey avgera sjálv, hvørjar verkætlanir tey vilja stuðla. Einasta treytin frá føroysku myndugleikunum er, at peningurin verður játtaður so ella so.

Til dømis er nógvur peningur játtaður til gransking, upplæring, góðskustýring, leiðslumenning, og ymsar útgávur og framleiðslur. Harumframt er stuðul eisini latin til ymsar útbúgvingar úti sum heima. Talan hevur bæði verið um bókligar og praktiskar útbúgvingar.

Til stuttleikar kann nevnast, at tutlað var nógv í krókunum, tá ein golf-stjóri fekk 200.000 krónur í lumman. Men hetta var ikki tað bera fjant og fjas, vísir Petur Joensen á:

- Ætlanin hjá fyrireikarunum var at kanna, um tað ber til at skipa fyri golfspæli í Føroyum, sum eitt tilboð til vælhavandi ferðafólk. Tí var hesin stuðul givin sum menning í ferðavinnuhøpi, sigur hann.

Úr stóru rúgvuni av verkætlanum, útbúgvingum og persónum, sum hava fingið stuðul til vinnuliga førleikamenning kunnu nevnast: fjarlestur á Robert Gordon University í Aberdeen, ymsar verkætlanir á Fróðskaparsetrinum, vindorkukanningar hjá SEV, kanningar í samband við alduorku, orðabøkur (Sprotin), Óli Breckmann (bókaútgáva um skatt), og mangt mangt annað. Ymsu oljufeløgini, ella samtøk, hava stuðlað ymsum endamálum hvør í sínum lagi.

Førleikapeningur hevur eisini ført til, at føroyingar nú eru farnir at læra aðrar oljutóðir at leita eftir olju. KT-fyritøkan Simprentis hevur nevniliga fingið førleikapening til at menna oljuforritið OilSim, sum nú verður brúkt til undirvísing í nógvum heimsins londum.

### Gjald fyri at troyta náttúrutilfeingi

Petur Joensen heldur, at orðið "førleikamenning" kann misfatast, tí í veruleikanum er talan ikki um menningarhjálp. Hann metir ei heldur, at útlendsku fyritøkurnar meta Føroyar sum nakað menningarland.

- Hugsanin við stuðuli til førleikamenning er, at tað verður hildið rímuligt, at útlendskar fyritøkur, sum koma higar at troyta okkara náttúrutilfeingi, rinda eitt gjald afturfyri, sigur hann.

Hann vísir á, at útlendingar sum koma higar ofta eru sera hugtiknir av, hvussu væl samfelagið er útbygt, hóast Føroyar liggja so forfjónaðar mitt úti í Atlantshavinum.

**Fakta**

Ein uppgerð pr. 31. desember 2005 vísir, at játtaðar vóru 81 mió. krónur til førleikamenning, meðan 27 mió. krónur vóru eftir. Tølini eru ein samanlegging frá nýggjasta yvirlitinum yvir einstakar játtanir.

*Fyrsta loyvisrunda (status pr. 31.12.2005):*

| Øki | Upphædd (mió. krónur) |
|---|---|
| Vinnulig endamál | 54 |
| Útbúgvingar | 25 |
| Onnur endamál | 2 |
| Tilsamans | 81 |
| Samlað skylda | **94 mió. krónur** |
| Eftir at brúka | **13 mió. krónur** |

*Onnur loyvisrunda (status pr. 31.12.2005):*

| | Upphædd (mió. krónur) |
|---|---|
| Brúkt | 0 |
| Samlað skylda | **14 mió. krónur** |
| Eftir at brúka | **14 mió. krónur** |

Leggjast skal afturat at pr. 31. desember 2006 vóru 10 mió. krónur blivnar játtaðar afturat. Sostatt vóru tilsamans 17 mió. krónur eftir við árslok 2006.

*Kelda: Jarðfeingi*